# Frændur spæla í Havn og í Fuglafirði um vikuskiftið



**Best umtókti bólkurin í landinum verður at hoyra um vikuskiftið. Fríggjakvøldið í Platform í Havn og leygarkvøldið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Frændur vóru við á stóru ólavsøkukonsertini fyri kortum, og har gjørdust teir stóru sigursharrarnir. Teirra kendu sangir hava framvegis fastatøkur á ungdóminum í landinum, og til hvønn tann einasta sang, teir spæla, syngja hundraðtals røddir við allatíðina.

Frændur eru eitt fyribrigdi, sum ikki hevur sín líka í føroyskum tónleiki. Sangirnir, sum teir hava givið út síðani 1984, eru so væl móttiknir millum fólki, at hvørt mansbarn dugir eina røð av sangum hjá teimum.

Næsta ár verða Frændur 20 ár, men í hesum seinasta árinum sum tannáringar hava teir kunnað staðfest, at tað finnist eingin størri føroyskur tónleikabólkur enn teir.

Eftir ólavsøkukonsertina høvdu øll Frændur á munni. Bólkurin skaraði fram úr millum allar bólkarnar, sum spældu hetta kvøldið, og nú verður so møguleiki at hoyra Frændur aftur á palli.

Fríggjakvøldið fara teir á pall á Platformi í Havn. Har rokna tey við, at nógv fólk fara at koma til hesa live framførslu hjá Frændum.

Tað sama vænta tey í Fuglafirði. Har verður framførslan í Mentanarhúsinum leygarkvøldið frá kl 23.30 til 03.45.

Bussar koyra úr Havn, av Strondum, av Toftum, úr Sørvági og úr Vestmanna áðrenn dansin og heimaftur aftaná.


SUMMARSTEVNA
á Selatrað

Vikuskiftið 22.-23. aug. verður summarstevna Javnaðarfloksins hildin á skótadeplinum á Selatrað.

Karmarnir um summarstevnuna í ár verða teir allarbestu á hugnaliga skótadeplinum. Tí verður eisini lagt soleiðis til rættis, at javnaðarfólk kunnu møta fjølment, konur og menn, børn, ung og gomul.

Friggjakvøldið byrjar við hugna um bálið, við røðu, søgum og sangi – afturvið harmonikutónum og onkrum til matnað.

Leygardagin verða tiltøk og spøl til børn, fyrilestur og sjónleikur – alt í tí friðarliga og vakra umhvørvinum á Selatrað. Ein part av degnum verður floksleiðslufundur har álitisfólk floksins møta. Tá er samstundis skipað fyri øðrum tiltøkum fyri tey, sum ikki luttaka á floksleiðslufundinum.

Til ber at gista á skótadeplinum, har pláss er fyri eini 60 fólkum.

Er veðrið ikki til vildar til øll tiltøk uttandura, ber til at vera inni í stórum tjaldum og felagshúsinum

Summarstevnuskráin er henda:

Friggjadagin:

| | |
|---|---|
| kl. 20.00 | Søgur og sangur um bálið – Frits Johannesen heldur bálrøðu. Okkurt er til matnað og drekka |

Leygardagin:

| | |
|---|---|
| kl. 09.00 | Morgunmatur |
| kl. 10.00 | Gongutúrur, onnur tiltøk og spæl |
| kl. 10.00 | Floksleiðslufundur |
| kl. 12.00 | Døgurði |
| kl. 13.00 | Viðgerð av politiskum tilmælum |
| kl. 13.00 | Tiltøk fyri børn |
| kl. 15.00 | Lossingarmenn í Havn - Erland V. Joensen greiðir frá |
| kl. 16.00 | Sjónleikur - GRÍMA við søgum úr Krabbaurð |
| kl. 18.00 | Náttverði |

Fyri at tryggja sær pláss at gista og til høvuðsmáltíðirnar er neyðugt at melda seg til á tel. 312 493, 225 344 ella á tel 221 919 ella á heimasíðuni www.javnadarflokkurin.fo.

Vælkomin og møtið fjølment!

**Føroya Javnaðarflokkur og Sosialistiskt Ungmannafelag**

Javnaðarflokkurin


# Svimja seg til Guinness umborð á Norrönu

**Í løtuni er 23 svimjarar millum 10 og 16 ár úr Gøtu í ferð við at svimja seg til eitt met, sum ætlanir eru at fáa í metbókina hja Guinness**

SVIMJIMET
*Tíðindaskriv*

Tað er ikki nakar vanligur frítíðartúrur teir 23 ungu svimjararnir úr svimjifelagnum Skeggjar úr Gøtu eru á, nú Norröna er á veg til Bergen og heimaftur.

Ungu svimjararnir, sum eru millum 10 og 16 ár, hava ætlanir um at seta eitt met, sum felagið vónar kann koma í metbókina hjá Guinness. Ramman um metroyndina er svimjihylurin umborð á Norrönu, har svomið hevur verið líka frá tí, Norröna legði frá landi kl. 8.30 í gjáramorgunin (mánadag), til hon leggur til aftur seinnapartin í morgin (mikudag). Bert avbrotið í einum steðgi upp á fáar tímar, meðan skipið liggur at í Bergen.

Beint undan miðdegi í dag høvdu svimjararnir lagt 74 kilometrar aftur um seg, og fram til klokkan 14.45 mikudagin verður strembað ímóti at leggja í minsta lagi 150 kilometrar aftur um bak. Tað skuldi so verið nóg mikið til at fingið metroyndina góðtikna av Guinness.

Sambært einum brævi frá Guinness til svimjifelagið er tó óvist, um metið hjá gøtuskjeggjum verður góðtikið í fyrstu atløgu. Ein av fyrireikarunum, Sørin Djurhuus, vónar tó, at hetta fer at eydnast. Redaktiónin hevur í øllum førum biðið um at fingið alt tilfarið um metroyndina tilsent, so møguleikararnir áttu at verið til staðar, heldur hann.

Svimjingin umborð á Norrönu er eisini skipað sum stuðulssvimjing, har einstaklingar og fyritøkur hava lovað at stuðla tiltakinum.



*Við at leggja í minsta lagi 150 kilometrar aftur um bak, vóna ungu svimjararnir úr svimjufelagnum Skeggjar úr Gøtu, at koma í metbókina hjá Guinness*



# Føroyar millum dálkandi flaggskipini

**Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, rópar varskó í sambandi við heimsumfatandi hitabylgjuna, sum eisini hevur herjað í Føroyum. - Miðalhitin her heima er vaksin við 1-2 hitastigum í ár, og hetta er eitt úrslit av dálkingini, sigur fólksins veðurmaður, Petur Skeel Jacobsen, sum vísir á eina hættisliga støðu**



*Fólksins veðurfrøðingur, Petur Skeel Jacobsen, setir sól og summar í eitt øðrvísi høpi. - Hetta er eitt úrslit av dálking, sum m.a. Føroyar eiga sín stóra leiklut í, sigur Petur Skeel*

HITABYLGJA/-DÁLKING
*Heini í Skorini*

Hóast vit merktu meiri til fløvandi sólargeislarnar fyrr í ár, taka norðurlendsku grannar okkara í hesum døgum glaðbeintir havastólarnar fram, grilla og hugna sær í sólskininum. Men veðurfrøðingarnir seta harafturímóti knyklar í brýr.

Talan hevur nevniliga verið um eina óvanliga og møguliga hættisliga hitabylgju í Europa og um allan heim, sum serliga hevur gjørt seg galdandi í grannalondum okkara sum Danmark, Týsklandi og Onglandi.

## Fleiri met

Í ár er hitin í Onglandi mátaður at vera á 37 hitastigum, og tað er nýtt met. í Danmark restaði lítið í nýggjum meti. 32 hitastig eru máld í Danmark í august, meðan metið er á 36,4 hitastigum, sum varð mált 10. august í 1975, altso um somu tíð. Í Týsklandi hevur talan eisini verið um met.

Føroyski veðurfrøðingurin, Petur Skeel Jacobsen, vísir á, at í Føroyum hevur talan eisini verið um meiri hita enn vant er.

- Í miðal er hitin í ár í Føroyum vaksin við 1-2 stigum, og tað er sera stórur vøkstur uppá bert eitt ár, slær veðurfrøðingurin fast.

## Vaktrarhúsárin

Høvuðsorsøkin til hitabylgjuna í ár er sambært Petur Skeel vakstrarhúsárinini, sum er eitt úrslit av dálkingini.

- Ov nógv útlát er av evninum $CO_2$, og hetta ger, at hitin kemur inn, men sleppur ikki út aftur, eins og í einum vakstrarhúsi. Sólargeislarnir, sum verða sendir móti jørðini, eiga eisini at verða kastaðir aftur, men orsakað av nógva $CO_2$ útlátinum sleppur hitin ikki út aftur, og tískil er hitin eitt úrslit av dálking.

## Ídnaðarlondini heitast

Áskoðan veðurfrøðingsins um dálkingina sum høvuðsorsøk verður meiri ella minni staðfest, tá hugt verður at, hvørji lond hava havt størstan hitavøkstur.

- Sambært mátingunum hava ídnaðarlondini verið fyri størsta hitavøkstri í ár, og júst hetta undirbyggir, at dálking er høvuðsorsøkin til náttúrunnar óreglusemi.

Sum kunnugt teljast átjan oyggjar okkara millum hesi lond, og tískil er talan um ein sera viðkomandi og aktuellan trupulleika fyri umhvørvispolitikk í Føroyum.

*Í miðal er hitin í Føroyum uppá eitt ár vaksin við 1-2 hitastigum, og tað er óvanliga nógv. Orsøkin er m.a. stóra og dálkandi útláti okkara av $CO_2$, sigur Petur Skeel*

## Globali hitin í vøkstri

Petur Skeel Jacobsen vísir á, at hetta er eitt hættisligt tekin, tí um menniskjan heldur á at grípa oyðileggjandi inn í náttúrunnar gongd, verður úrslitið skaðiligt.

- Globali hitin er vaksin við 0,7 hitastigum í ár, og tað er nógv í so stuttum tíðarskeiði. Av ítøkiligum avleiðingum hava t.d. sera nógvir skógareldar verið kring heimin í ár, tí plantu- og skógarlívið ikki megnar hitan, sigur ein hugsunarsamur veðurfrøðingur.

## Hvussu við Kyoto sáttmálanum?

Við einum hitavøkstri á 1-2 hitastigum gjøgnum bert eitt ár er Føroyar eitt førandi land í hesum høpi, og júst eitt høvuðseyðkenni Føroya á umhvørvispolitiska økinum eru ovurstóru nøgdirnar av $CO_2$, sum verða latnar út í atmosferuna, einamest av skipaflotanum.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum, hevur enn ikki tikið undir við Kyoto sáttmálanum (sáttmáli, sum ásetir $CO_2$ útlát pr. íbúgva), og hitavøkstur okkara er júst eitt úrslit av vantandi luttøkuni í stríðnum at basa dálkingini.

Við einum relativt stórum skipaflota og fiskivinnuni sum næstan suverenu høvuðsinntøku landsins er sjálvsagt torført at taka støðu til Kyoto sáttmálan, men av landsins avvarðandi myndugleikum átti spurningurin av álvara at verið tikin upp og umhugsaður, um Føroyar veruliga skal vera ein førandi tjóð á hesum øki og hava ivasama heiðurin at vera eitt av mest dálkandi londum.

Vit hava til fragd at vísa náttúru okkara fram fyri ferðandi, vit búleikast í náttúruni, forfedrar okkara bygdu hetta land gjøgnum náttúrunar tilfeingi, men tá tað kemur til stykkis, tykist eingin virðing vera fyri henni...?



# NCC bíligast við 9 mió

**Fyrsta stigið til sjálvt arbeiðið við Norðoyatunnlinum varð tikið týsdagin, tá tilboðini skuldu vera inni til atkomuvegin leirvíksmegin. NCC, sum stóð fyri arbeiðnum við Vágatunnlinum, hevur bíligasta boðið á 9 mió.**



*- Vit eru glaðir og nøgdir fyri luttøkuna og boðini til vegagerðina, vit hava fingið frá hesum fimm fyritøkunum, segði Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Norðoyatunnlinum, sum her situr við endan av fundarborðinum við lisitatiónina týsdagin*

NORÐOYATUNNILIN
*Heini í Skorini*

Fimm boð vóru komin Partafelagnum Norðoyatunnilin í hendi við lisitatiónina týsdagin kl 14, tá evstamark var at søkja um arbeiðið. Sjey umsøkjarar vórðu góðkendir, men tveir valdu ikki at bjóða seg fram.

## Javnt millum bíligastu boðini

Boðini, P/F Norðoyatunnilin hevur fingið, eru komin frá NCC, J & K Petersen, Pihl & Søn Føroyar, Kanjon og M.T. Højgaard Føroyar. P/F Norðoyatunnilin upplýsir, at bíligasta tilboðið kom frá NCC, sum stóð fyri Vágatunnlinum, og var hetta á góðar 9 mió. kr.

Tó er sera javnt millum trý tey bíligastu boðini, og tískil tykist talan vera um kapping at standa fyri vegagerðini leirvíksmegin. Munurin er stórur millum boðini, tí frá teimum bíligastu boðunum á góðum 9 mió. krónum eru dýrastu boðini uppi á 22 mió. krónum. Metingin fyri sjálvt arbeiðið er á umleið 13 mió. krónur. Dávur Reinert Hansen, stjóri á Norðoyatunnlinum, lat væl at við lisitatiónina.

- Vit eru glaðir og nøgdir fyri luttøkuna og boðini, vit hava fingið, og talan hevur verið um ein stóran arbeiðsinnsats frá fyritøkunum, sigur ein vælnøgdur stjóri.

## Avgerðin um tvær vikur

Sostatt skal P/F Norðoyatunnilin næstu dagarnar taka støðu til, hvør skal hava ábyrgdina av vegagerðini í Leirvík.

Partafelagið upplýsir, at ætlandi skal sáttmáli undirskrivast 26. august, og saman við ráðgevaranum, Landsbyggifelagnum, skal metast um bestu avgerðina.

- Vit leggja størstan dent á kostnaðin, tíðarætlan og arbeiðsætlan, og í høvuðsheitum verður avgerð tikin við støði í hesum viðurskiftum, sigur Dávur Reinert Hansen.

Treytað av endaligum avtalum um lendi og viðgerð í Yvirfriðingarnevndini er ætlanin, at arbeiðið skal byrja tvær vikur eftir 26 august. Vegagerðin og inntakið til tunnilin skal vera liðugt um mánaðarskiftið november/desember í ár, tá tunnilsgerðin eftir ætlan skal byrja Leirvíksmegin.

## Stóra avgerðin hálvan oktober

Hóast avgerð í næstum verður tikin um vegagerðina leirvíksmegin, verður stóra avgerðin tikin hálvan oktober. Sambært Dávi Reinert Hansen verður tá avgjørt, hvør skal standa fyri sjálvari borðingini og tunnilsgerðini, sum eftir fyrstu meting ljóðar at kosta 325 mió.

- Arbeiðini verða bjóðað út í september, og avgerðin verður tikin hálvan oktober. Eingin fyritøka er góðkend enn, men vit hava havt eina pre-kvalifikatión, sigur stjórin í P/F Norðoyatunnlinum, Dávur Reinert Hansen, at enda.